# Fyriskipanin frá 3.5.1723 um handil í Føroyum og kærurnar um hana

*Peter Korsgaard.*

Longu frá fyrst í 16. øld hevði danska krúnan einarætt til at standa fyri Føroya handli við útheimin. Hesin rættur varð aloftast burturfestur til einstaklingar ella feløg, men av og á, tá ið leigumálið var úti ella tað varð misrøkt, tók ríkið um endan og røkti handilin fyri egna rokning. Hetta hendi m. a. frá 1709 til 1856, tá ið handilin varð fríur.

Sama um tað vóru einstaklingar, feløg ella ríkið, ið høvdu handilsrættin, so varð prísurin á keyptum og seldum vørum (taksturin) ásettur við fyriskipanum. Soleiðis varð hvør einasta fyriskipan ein fastløga av býtisviðurskiftunum millum Føroya og Danmarkar. Í Føroyum hevði nýggjur takstur eisini við sær skiplanir í búskaparvánunum hjá ymsum samfelagsbólkum alt eftir, hvussu tey vørusløg, teir keyptu og seldu, vórðu sett í prís.

Áðrenn handilsrætturin kom undir kong í 1709, hevði hann í næstan hálva øld verið burturfestur til Gablarnar[1], og henda tíð hevði givið hvørki teimum, ið handilin høvdu í hondum, ella føroyingum stórvegis vinning. Ein høvuðsvansin hevði verið ovurframleiðsla av hosum, og harafturat kom, at fiskiskapurin hevði verið fyri stórari afturgongd. Hosurnar vórðu seldar mest til Hálands[2], men marknaðurin var svikaligur og gav aloftast tap. Hesar vansar fekk ríkið í arv.

Tað hevði verið nógv illstøða millum føroyingar og handilsfólkið, og tvær reisir sendu føroyingar sendinevndir til Keyp-

mannahavnar at klaga, í 1683 og 1690—91. Nevndin, sum dømdi í seinna málinum, var í parti við føroyingum[3], og dómur hennara og eftirfylgjandi fyriskipanin um nýggjan takst frá 30.5.1691 vóru føroyingum til fyrimunar. Tað, sum í hesum høpi hevur mestan áhuga, var, at ullarprísurin varð settur ógvuliga høgt, 6 fl (t. e. gyllin) fyri vágina, men harafturímóti varð ásett »kvantum« til tess at fáa minkað um hosurúgvuna. Við »kvantum« er at skilja, at hvør einasti føroyingur skuldi, tá hann avreiddi hosur til krambúðina, eisini avreiða eina ávísa nøgd (»kvantum«) av reinari, óvirkaðari ull. Í fyriskipanini varð lutfallið millum hosur og ull sett til 3:1 í virði, soleiðis at maður, ið avreiddi eina vág av ull fyri 6 fl, í mesta lagi kundi avreiða hosur fyri 18 fl. Um ullartaksturin lækkaði, kundu ikki verða avreiddar so nógvar hosur sum fyrr, uttan so at lutfallið fyri »kvantum« eisini varð broytt.

Hesin høgi ullarprísurin (meiri enn tvær ferðir so høgur sum søluprísurin í Danmørk og Hálandi) var atvoldin í, at tað var ógjørligt at fáa vinning av handlinum; men samtíðis fekk hann eisini avleiðingar í Føroyum. Stórbøndur og prestar høvdu so nógv av ull til avlops, at teir komu ikki útyvir at fáa hana virkaða til hosur heima hjá sær sjálvum, og tí vóru teir í fyrstu syftu hugaðir fyri so høgum ullarprísi sum til bar. Hinvegin vóru teir, sum minni høvdu av jørð, heftari av hosugerð og tí hugaðir fyri at »kvantum« varð avtikið. At enda vóru tað teir, ið heilt lítið áttu av jørð og teir jarðarleysu, sum máttu keypa ull, um teir skuldu virka hosur. Umframt tað, at teir løgdu dent á, at »kvantum« varð avtikið, vildu teir fegin hava lágan ullarprís; hin ásetti prísurin kom at vera lágmarksprísur á føroyska marknaðinum (flutningsgjald undantikið).

Tá ið Christoffer Gabel á sinni hevði tikið handilin fyri lívstíð sína og sonar síns, var tað fyrst fyri eitt lágt gjald, síðan fyri einki gjald til ríkið. Av teirri orsøk hevði ríkið við teim fyriskipanum, ið seinni vórðu givnar, bert eitt megináhugamál at røkja: tað hjá landsfólkinum. Tá ið ríkið tók

við handlinum í 1709, fekk tað alt í einum fleiri áhugamál; umframt tað at halda uppi fólki og vinnulívi mátti ríkið eisini hugsa um fíggjarúrtøkuna, serliga sum avgjald fyri leiguna av handlinum. Henda burturleiga var í rentukamarinum ætlað til at verða stutt eftir, at Norðurlandabardagin mikli var av.

Meðan Norðurlandabardagin mikli var, hevði ríkið stórt tap av handlinum. Hetta komst fyri ein part av bardaganum, men størsta orsøkin til tapið var ullin, sum varð seld fyri prísir, ið lógu væl niðan fyri avreiðingarprísin, og hosurnar, sum at kalla ikki var sleppandi av við. Við hesum í huga gjørdi rentukamarið í 1714 uppskot um nýggjan takst[5]; tað týdningarmesta við honum var, at ullarprísurin varð lækkaður úr 6 fl niður í 3 fl 12 skinn fyri vágina. Afturfyri varð taksturin á fløti og lýsi hækkaður[6]. Í takstuppskotinum varð ikki tikin beinleiðis støða til at broyta »kvantum«, men óbeinleiðis varð hosunøgdin uppaftur meira skerd, við tað at »kvantum« varð roknað eftir virði (fyri eina ullarvág á 3 fl 12 skinn skuldu nú bert kunna verða avreiddar hosur fyri í mesta lagi 10 fl 16 skinn). Men kongur gjørdi av at bíða við málinum, men tó skuldu føroyingar verða mintir um at gera góðar hosur[7].

Tað var alt truplari at sleppa av við hosur, og tað hevði við sær, at í 1717 máttu teir beina fyri 120.000 pørum, sum vóru oyðilagdar á goymslu[8]. Í rentukamarinum varð enn hugsað um takstbroyting, og takstuppskotið frá 1714 varð sent landfútanum í 1718[9]. Rentukamarið bað um hansara og føroyinga viðmerkingar til uppskotið; samtíðis fekk hann kortini boð um at lata føroyingar skilja, at uppskotið var teimum til bata.

Nakað svar tykist ikki vera til skjals, men tá ið tann nýútnevndi stiftsyvirmaðurin Peter Raben[10] fyrst í september 1720 vitjaði í Tórshavn við »Søeridderen«, hevði honum verið skipað at skifta orð við føroyingar um takstin[11]. Við sær hevði hann eitt uppskot frá rentukamarinum; á tað hevur hann skrivað sína fatan av tí, sum føroyingar hildu[12]. Harumframt eru í brævabókini hjá Sámali Pæturssyni løgmanni avrit av

brøvum til Raben frá 5. og 6. september við takstuppskotum[13]. Hesi brøv hevur Raben helst fingið við sama høvi.

Høvuðsevnið í nýggja takstuppskotinum frá rentukamarinum var aftur at lækka ullarprísin niður í 2 fl 14 skinn fyri vágina, og at hækkanirnar í prísinum á lýsi og fløti í uppskotinum frá 1714 vórðu skerdar. Føroyingar skutu upp at lækka ullarprísin niður í 3 fl fyri vágina og hækka smávegis prísin á smøri, lýsi, fløti og fiski. Teir hava neyvan kent uppskotið, ið Raben hevði við sær, tí tilboð teirra um fløtprís var lægri enn tað, ið rentukamarið vildi lata. Uppskotið hjá Sámali Pæturssyni líktist yvirhøvur tí, sum Raben fataði sum tilboð føroyinga, uttan hjá honum var ullin sett til 4 fl fyri vágina.

Við samráðingar um takstin 3 ár eftir í Keypmannahavn hevur Raben greitt frá samráðingum við føroyingar um ullartakstin og »kvantum«[14]. Raben hevði tá spurt bøndurnar, um teir vóru nøgdir við 3 fl fyri vágina av ull. Hesum høvdu bøndurnir samtykt í, men dagin eftir, tá ið teir vóru samankomnir í stovuni hjá keypmanninum, høvdu teir kravt 4 fl. Síðan hevði Raben strongt á teir at fáa at vita, hví teir høvdu broytt krav sítt, og serstakliga ein nevndur Tummas í Vágum (»Thomas i Vågø«), hevði sagt, at prestarnir høvdu fingið teir til tað. Raben fekk teir so til at samtykkja í, at teir kundu hjálpast við 3 fl, um teir kundu sleppa frá »kvantumi«.

Orðunum hjá Tummasi í Vágum eru eyðvitað ikki fult eftirfarandi, men tey hóska við tað, sum seinni hendi og áhuga prestanna fyri høgum ullarprísi. Nakað tað sama kom Raben til, tá ið hann skrivaði frágreiðing sína til rentukamarið 9.10. 1720, har sum hann segði almúguna vera fúsa til broyting, men at nakrir av prestunum vóru ímóti og høvdu kirkjurnar til viðberingar[15].

Takstuppskotini vórðu tó beind til viks í rentukamarinum eina tíð, meira umráðandi var nú arbeiði við at fyrireika burturfestingina av handlinum, ið stundaði til. Hesum spurdist tó einki burturúr; trý uppboð vórðu hildin í 1721, men til fánýtis. Ein hin største forðingin fyri burturfesting hevði verið taksturin, og hetta blásti aftur lív í royndirnar at fáa hann broyttan.

Skund hevði tað tó ikki, tí eitt tilmæli (»forestilling«) frá 2.3.1722 mátti verða uppafturtikið tvær reisir, áðrenn tað fekk úrskurð 3.8.1722, og hann ljóðaði bert uppá, at tann taksturin og fyriskipanin skuldu verða send sýslumonnunum til ummælis. Endamálið við hesum er ræattiliga ógreitt, — tó tað samstundis stóð í viðmerkingunum, at sýslumenninir mundu vera hugaðir fyri høgum ullarprísi, tí teir áttu nógva ull[16]. Rentukamarið hevði eisini á »lægri stigi« arbeitt við takstinum. Nakrir keypmenn í Keypmannahavn høvdu fingið boð um at siga sína áskoðan um tann fyriætlaða takstin og sendu svar sítt 5. august, tveir dagar aftan á úrskurðin[17]. Seinni læt Sámal Pætursson løgmaður svar sítt frá sær, dagfest 2. oktober[18]. Til at seta nýggjan takst og gera fyriskipan vórðu útnevndir Christian Carl Gabel[19] og Raben, sum skuldu hittast saman við fíggjarmálaumboðsmonnunum í rentukamarinum (finansdeputerede)[20]. J. F. Hammershaimb fúti í Føroyum var um hetta mundið í Keypmannahavn, og hann fekk boð um at vera til taks[21].

Vansamálini við arbeiðinum vóru ikki stór, tí tað hevði leingi verið greitt, hvønn vegin broytingarnar skuldu fara, og frá nevndarsetingini[22] til tilmæli, úrskurð og fyriskipan[23] leið ikki long tíð. Í tilmælinum hevði Raben uppskot um úthandil í Suðuroy og Gabel um ein í Norðuroyggjum, og hetta varð eisini samtykt[24].

Nýggi taksturin og fyriskipanin frá 3.5.1723 og serstakliga ullarprísurin upp á 3 fl fyri vágina, vórðu ivaleyst til umrøðu millum manna í sambandi við løgtingið, ið var sett á ólavsøku 1723. Orðaskiftið endaði við at samtykt varð eitt bønarbræv, sum skuldi verða flutt av tveimum umboðsmonnum fyri føroyingar, og kosnir vórðu til hetta Grækaris (Gregers) Müller rektari við Havnar skúla og Hanus Jóansson (Hans Joensen) bóndi.

Bønarbrævið byrjaði við eini lýsing av seinastu árunum, tá alt hevði sligið frá, serliga varð hin vánaliga ullarúrtøkan nevnd. Hetta saman við tí at hald varð lagt á hosurnar í handlinum (tí at tær vóru vánaligar) hevði havt við sær, at

eingin peningur var, og fólk mátti liva við slýggj[26], tang, gras og fliður[27].

Í bønarbrævinum bóðu menn um at sleppa undan »kvantumi«, tí at landið hevði ikki ráð til at selja ullina fyri 3 fl fyri vágina, og kirkjurnar risu ikki undir nýggju takstunum. Umframt hetta vóru fleiri klagumál um krambúðina, serstakliga um at hald varð lagt á vánaligar hosur. Bønarbrævið var undirskrivað av løgmanni, sorinskrivara, næstan øllum prestum og sýslumonnum og at enda tveimum monnum úr hvørjari sýslu vegna Føroya land.

Tað man einki vera at ivast í, at føroyingum hevur verið tørvur at klaga, tí síðan 1716 høvdu verið óár bæði á sjógv og landi, og handilsforvaltarin hevði — ætlandi við tí stóra hallinum av hosunum í huga — verið kvikur at vraka.

Klagurnar um innlendis viðurskifti vóru harðmæltar, og nýggi taksturin og fyriskipanin hava helst gjørt sítt til at elva til misnøgd.

Í hesum sambandi verður ikki nomið við klagurnar um innlendis viðurskifti, tær vóru heldur ikki til stóran ampa við samráðingarnar seinni; her skulu vit bert líta at klagunum um nýggja takstin. Forvitnisligt er tað við orðingini í bønarbrævinum, at høvuðskravið tykist vera, at »kvantum« verður avtikið, men grundgevingin var hin lági ullarprísurin; tað læt so upp fyri einum øðrum møguleika: at hækka ullarprísin. Tann vegin bendi eisini umrøðan um trupulleikarnar hjá kirkjunum.

Ætlandi eru sendimenninir ikki farnir til Keypmannahavnar beinan vegin; eitt var at teir skuldu fyrst greiða síni egnu viðurskifti (millum annað skuldi rektarin fáa varamann í sín stað), annað var, at teir noyddust at bíða eftir skipi. Bønarbrævið er ið hvussu er ikki komið til rentukamarið fyrr enn 19.11.1923[28].

So hevði Hammershaimb fúti meiri skund. 16. august sendi hann rentukamarinum avrit av bønarbrævinum saman við viðmerkingum sínum til tað[29]. Niðurlagið í viðmerkingunum var, at tað var tað órættvísa jarðarbýtið, sum hann helt eiga skuldina fyri tær vánaligu tíðirnar. Størstu bøndurnir, teir ið høvdu

10—30 merkur, vóru ikki førir fyri at velta jørðina til lítar, og seyðurin varð vargur. Høvdu garðarnir heldur verið um 6 merkur, mundu nógv fleiri kunnað livað av jørðini.

Hann legði serligan dent á, at støðan hevði verið ov dapurliga myndað, og at atvoldin til tey vánaligu korini hjá fátækafólki var sjálvsøkni teirra ríku. Ullarprísinum viðvíkjandi vísti hann á alla jørðina, sum prestarnir sótu við og ta stóru rúgvu av tíggjundarull, teir fingu. Kirkjurnar høvdu aldri fingið meiri enn 3 fl fyri vágina av vaskaðari ull, tí fyri henda prís varð hon seld kirkjuverjunum, sum virkaðu hana til hosur. Kirkjunum nýttist tí ikki at líða hall[30]. Úrfáningur hansara burtur úr hesum var, at »Her staar da kirckerne som et Decke for Sollicitanterne«. Av tí at teir fátæku ikki sum prestar, óðalsbøndur og kongsbøndur kundu lata »kvantum«, kundu teir heldur enn kirkjuverjarnir fingið loyvi til at keypt tíggjundarullina.

Hann var ráðgevi við tilevningina av fyriskipanini og takstinum og tí ikki løgið, at hann ber í bøtuflaka fyri teimum. Dagin eftir at bønarbrævið kom til rentukamarið var Gabel, Raben og Worm biskupi[31] boði til fundar við fíggjarumboðs menninar tí viðvíkjandi[32].

Fyrsti fundurin varð hildin 16. desember. Hvussu fundurin var, og um biskupur og hinir longu tá vóru ójavnir á máli, ber ikki til at siga, tí einki er varðveitt frá fundinum. Men tað sjáldsama er, at fundurin verður ikki nevndur uttan á einstøkum støðum[33], men at næsti fundur (22. desember) í tilmælinum (sum Worm ikki var við til at gera) verður nevndur tann fyrsti.

Til næsta fund, 22. desember, høvdu Grækaris Müller og Hanus Jóansson latið inn nýtt bønarbræv, har sum teir greiða gjøllari frá sjónarmiðum sínum[34]. Nú tóku teir fram, at vinningurin við hosubinding var lítil og eingin, og at lækkan í ullarprísinum sveið til kirkjur og prestar.

Teir góvu upp, at tað tók einum fólki 2 dagar at gera einar grovar hosur, meðan tað tók eini arbeiðskonu 4 dagar at binda einar langar hálvfínar hosur. Ein maður kundi ikki eftir einum

degi karða og spinna tað $^3/_4$ pund av ull, sum fór til einar langar hálvfínar hosur. Hetta røkk ikki til lægsta livikostnað, sum segðist vera 6 skillingar um dagin. Her var nógv avgjørt, tí tað var ikki nær ella náminda so seinført at virka ullina[35]. Ei heldur var hetta nøkur dygg próvgrund, tí um tað loysti seg ikki at binda hosur, var avtøkan av »kvantumi« eingin bati, og um ullarprísurin varð hækkaður, gav hosubindingin uppaftur minni av sær. Tað einasta, sum frágreiðingin kundi hava batað, var við at geva eina mynd av neyð og vesaldómi, so at hugurin til eftirlæti yvirhøvur gjørdist betri. Klagurnar um hallið hjá prestunum og kirkjunum, um ullarprísurin varð lækkaður, vóru heldur ikki nøkur góð próvgrund, tí longu fyrr hevði verið orðað um, hvussu góð ráð prestarnir høvdu, og hvussu væl tað bar til hjá kirkjunum at selja ullina beinleiðis.

Á fundinum 22. desember helt Worm biskupur røðu[36], har hann tók undir við seinna bønarbrævinum frá føroyingum og studdi teir í einum og øllum, men hann fanst harðliga at fútanum, serliga tí, hann hevði sagt um prestarnar. Við neyðarstøðuni hjá kirkjunum í huga helt biskupur, at tað einasta rætta var at seta ullarprísin aftur til 6 fl fyri vágina; tað fór eisini at greiða vansan við hosusøluni, tí tá fór at verða bundið væl minni av hosum.

Hetta uppskot hevði beint fyri øllum vónum um á nøkrum sinni at fáa vinning av handlinum, og hinir luttakararnir hava ikki kunnað tikið undir við tí. Tað er ikki sørt, at teir eru ilskir í uppskotinum til tilmælið, og næstu tíðina var Worm biskupur at kalla ikki uppi í samráðingunum.

Tveir dagar eftir var Hanus Jóansson hjá Raben, helst eftir áheitan frá honum. Ið hvussu er var tað Raben, ið segði frá teimum omanfyri nevndu samráðingum millum hansara og føroyingar í 1720. Á tí sinni varð avtøkan av »kvantumi« nevnd sum tað, ið mest um vardi; hesum samtykti Hanus Jóansson eisini í[37].

Øðrvísi enn Hanus Jóansson hevði Grækaris Müller meira áhuga á ullarprísinum, og 29.1.1724 setti hann fram eitt nýtt

uppskot[38], tí fyrru uppskot hansara ikki høvdu verið góðtikin av øllum á seinasta fundi. Nú skeyt hann upp á ein ullarprís upp á 4 fl fyri vágina, men samtíðis skuldu fólk, ið høvdu minni enn 6 merkur í jørð, sleppa frá at lata »kvantum«. Harumframt skuldu fløt, lýsi og fiskur fara upp í prísi[39]. Til at strika undir álvarað við sendiferðini nevndi Grækaris Müller, at hann kostaði sjálvur varamann sín, og at hann tí vónaði at avgerðin fór at vera skjót.

At málið kom í drag stóðst ikki bert av ósemju, men eisini av »veikleika« hjá Raben; hetta skilst av einum boðbrævi (missive) frá rentukamarinum til hansara 29.1.1724, har hann verður ámintur um at greiða frá áskoðanini hjá sendimonnunum báðum — annaðhvørt í einum ella hvørjari sær — og frá sínum egnu hugsanum[40].

Næstu samráðingum við sendimenninar stílaði Smit rentuskrivari fyri[41]; 14. februar skrivaði hann niður hugsanir sínar[42]. Hann hevði verið við til at gera takstin í 1723, og tí var tað skiljandi, at hann ikki helt hann vera atvold í teimum vánaligu tíðunum í Føroyum. Vansamálið hjá honum var, at tað var longu tap av hosum og ull, men ikki var ráðiligt at herða politikkin, tí so fóru uppaftur fleiri vørur at verða seldar í loynihandli. Smit gjørdi lítið burtur úr kirkjuullini, sum hann helt bera til at selja beinleiðis, so at kirkjuverjarnir vórðu fyri tapinum.

Tá tað galt um hugsanina um umbøtur í takstinum og fyriskipanini, hevði hann varnast ósemjuna millum báðar sendimenninar. Hann tordi ikki at samtykkja í uppskotinum hjá Hanusi Jóanssyni, tí at hosurúgvan var longu alt ov stór, men helt seg tætt at uppskotinum hjá Grækarisi Müller við at skjóta upp, at ullarprísurin varð hækkaður til 4 fl fyri vágina, og at »kvantum« varð avtikið fyri fólk, ið høvdu minni enn 6 merkur í jørð ella skóru 80 seyðir — um tað nú endiliga skuldi verða nøkur umbót. Uppskoti Grækarisar um at hækka prísin á fløti, lýsi og fiski kundi Smit samtykkja í — tó ikki sørt himprandi — tí tað var ikki so nógv til av hesum vørum, og á tann hátt kundi verið minkað eitt sindur um loynihandilin.

Dagin eftir, 15. februar, vóru sendimenninir báðir saman við Peder Rasmussen etatsráð og Hans Meyer justitsráð (ið báðir vóru kommitteraðir í rentukamarinum) aftur heima hjá Raben. Fyrst samtykti Hanus Jóansson í, at føroyingar skuldu lata kirkjunum 3 fl fyri vágina av óvaskaðari ull, og varð hesin spurningur soleiðis greiddur. Enn skeyt hann upp, at »kvantum« var avtikið, men kundi tó ganga undir 3 pør av hosum fyri ½ pund av ull ella møguliga helvtina av teirri ullarnøgd, ið tá kravdist. Hann helt tað eisini vera møguligt, at teir smáu jarðarmenninir kundu sleppa heilt undan »kvantumi«.

Samráðingarnar henda dagin endaðu við, at hann segði seg fúsan at samtykkja í, at ullartaksturin varð hækkaður til 4 fl fyri vágina við teirri treyt, at lutfallið fyri »kvantum« varð broytt til 1 pund av ull fyri 1 fl av hosum (ein niðurskurður í »kvantumi« av ullarnøgdini til 50 % eftir takstinum frá 1691 og til 25 % eftir takstinum frá 1723[43].

Til næsta fund gjørdi Smit útrokningar viðvíkjandi avreiddari ull í tíðarskeiðinum 1709—21[44]. Við takstinum 3 fl fyri vágina hevði ullin givið avlop upp á 2.137 ríkisdálar 25 skillingar, 4 fl hall upp á 1.040 ríkisdálar 71 skillingar, og við galdandi taksti 6 gl var hallið 7.396 ríkisdálar 63 skillingar. Harafturat kom, at ullin hevði verið í høgum prísi, meðan Norðurlandabardagin mikli var, og um táverandi søluprísur hevði verið grundarlagið, hevði hallið verið 10.487 ríkisdálar 32 skillingar. Aftur at hesum halli skuldu so útreiðslurnar verða lagdar; í tí, sum omanfyri stendur, varð bert hugt at muninum millum keyps- og søluprís. Útrokningin av samanlagda takstvirðinum av avreiddum vørum, ávikavist við takstinum frá 1691 og takstinum frá 1723 sum støði, sýndi ongan stórvegis mun[45].

Smit kom til tað úrslit, at skuldu broytingar verða gjørdar, skuldi tað annaðhvørt vera ein hækkan í ullarprísinum upp í 4 fl ella ein lækkan av »kvantumi« til ⅕ av ull. Hann var tó ikki fegin um hvørga broytingina, tí hann stúrdi fyri, hvussu tað so fór at verða við uppboðunum av handlinum til burturfestingar[46].

Eftir næsta fund, sum var 23. mars, kom Hanus Jóansson til Raben við einum umsóknarbrævi (memorial)[47], har hann sum sendimaður segði seg samtykkja í, at »kvantum« skuldi vera óbroytt, men ullarprísurin verða hækkaður upp í 4 fl. Kirkjurnar skuldu enn sum áður kunna selja ull sína óvaskaða fyri 3 fl.

Hetta umsóknarbræv sendi Raben sama dag til rentukamarið við góðkenning (accept) og harumframt tilmæli um smáar taksthækkanir á øðrum vørum. Rentukamarið sendi 25. mars avrit av umsóknarbrævinum og tilmæli Rabens til Worm biskup til ummælis[48]. Ummælið kom beinan vegin (dagfest 26. mars) og var heldur hvassorðað[49]. Worm greiddi frá tí, ið avrátt varð seinast (helst á fundinum 23. mars) um at halda fast við ullarprísin og »kvantum« fyri fyrst, og helt fyri, at um ein bóndi kundi kollrenna alt, ið avrátt hevði verið, skilti hann ikki, hví teir vóru samankomnir. Fyri sín part helt Worm fast við tað, ið avrátt hevði verið, men takstinum á góðu vørunum (fløti, smøri og lýsi) kundu teir góðu menn sjálvir ráða fyri. At enda kom hann við eini viðmerking, ið mundi ikki sørt særa teir, ið hon var ætlað, — um møguleikarnar fyri at fáa handilin burturfestan aftan á takstbroyting.

Grækarisi Müller varð sýnt umsóknarbrævið frá Hanusi Jóanssyni, og av tí at hann leingi hevði staðið upp á tær 4 fl fyri ullina, var gaman í hjá honum at samtykkja. Samtíðis legði hann afturat, at hann ynskti at lýsisprísurin varð hækkaður nakað[50].

Eftir at nýggi ullarprísurin hevði fingið góðkenning (accept), vóru ikki stórir vansar við viðgerðini eftirsíðan. Tilmælið var undirskrivað av Gabel og Raben, men Worm skrivaði ikki undir. Tað varð áritað av Bartholin (fíggjarmálaumboðsmanni) og Mönichen (kommitteraðum í rentukamarinum), at tað kundi sleppa ígjøgnum, men at ansað skuldi verða eftir, eftir hvørjum taksti áhugaðir vildu bjóða mest á næsta uppboði[51].

Úrskurður varð gjørdur 11. mai[52], enn við áritinum um at geva gætur eftir hvørjum taksti, ið hægst varð boðið eftir.

Tá ið úrskurðurin varð gjørdur, vóru teir útsendu føroying-

arnir longu heima aftur. Teir høvdu longu 13. apríl fingið eitt avrit av komandi tilmælinum (forestilling) og úrskurðinum við sær heim, og 25. apríl varð hann aftursendur við takkarorðum áskrivaðum av nøkrum føroyingum[53].

Eisini í rentukamarinum vórðu fyrireikingar gjørdar. Eitt uppkast til eina kunngerð (plakat) um handilsumbøtur í Føroyum frá ólavsøkudegi 1726, ið nevnir nýggja takstin, liggur í sama skjalapakka sum takkarskrivið frá føroyingum.

Tað lagaði seg so, at nýggi taksturin varð aldri settur í verk. Tvær hendingar kunnu hava gjørt sítt til tað. Hammershaimb fúti skrivaði 2.10.1724 til rentukamarið um komandi takstin og tók upp aftur klagur sínar vegna hini minni múgvandi um »kvantum« og tilætlaðu hækkanina í ullarprísinum[54]. Sjálvur skrivaði hann eftir áheitan (»efter Begier«), helst frá nøkrum føroyingum; rentukamarið hevði ið hvussu er ikki spurt hann.

Veruliga orsøkin til at einki varð úr takstinum, mundi heldur vera tann, at hóast trý uppboð og eitt tilætlað, øll í 1724[55], hevði ikki eydnast at finna nakran, ið hirdi at taka við Føroya handli.

Í 1747 stakk spurningurin um lovaðu hækkanina í ullarprísinum seg upp aftur; tað var Jákup Zitzke, ið fregnaðist eftir samtyktini frá 11.5.1724. Í rentukamarinum høvdu teir ilt við at finna málið fram aftur og fáa skil á, hví einki varð burturúr tá. Men við tað at øll ull í árunum 1744—47 hevði verið virkað til hosur, tóktust ongar áneyðir vera til broytingar, og varð úrskurður eisini gjørdur um tað[56].

Útnevningin av nøkrum serkønum til at greiða vansamálini, sum varð gjørd bæði tá taksturin varð settur og kæran skuldi verða viðgjørd, hevði natúrliga bakstøði sítt í tí lítla kunnleika, sum teir í rentukamarinum høvdu til Føroya. Tær høvdu verið burturfestar í mong ár. At Gabel varð útnevndur er eitt dømið, meðan Raben hevði heimild bæði sum stiftsyvirmaður og sum kønur í føroyskum viðurskiftum. Worm varð útnevndur embætis síns vegna til at røkja kirkjuligu áhugamálini.

Sjálv viðgerðin sýnir tá eisini rættiliga góðan kunnleika til búskapar- og almannaviðurskiftini í Føroyum, hóast teir ser-

kønu tykjast ikki geva gætur eftir tí rættiliga umvarðandi spurninginum, at taksturin fyri ull eisini fór at verða leiðvísandi fyri tann prís, ið tey fátæku skuldu rinda fyri ullina. Henda hugsan kemur ongastaðni fram í málsskjølunum.

Viðvíkjandi »kvantumi« og øllum kjakinum um tað, er tað forvitnisligt at bera saman við roknskapirnar um avreidda ull og hosur, sum er til skjals fyri árini 1709—18 og 1720[57]. Eftirkanning av teimum sýnir, at mong hava ikki avreitt ull og bert fá í tílíkari mongd, sum kemur í náminda av lutfallinum, ið sett er í fyriskipanini. Hugsandi er, at fyriskipanin hevur verið umsitin eftir meting og soleiðis, at góð ullarár góvu ikki upp á seg meiri av hosum. Annað, ið bendir á umsiting av takstum eftir skiftandi meting, er, at tá ið betur fór at gangast við at sleppa av við hosurnar, varð avreidd minni og minni og at enda eingin ull, hóast tað at fyriskipanin var óbroytt. At »kvantum« kortini hevur verið eitt kæruevni, kemst helst av, at tað hóast alt við hvørt hevur kenst sum eitt haft, serstakliga tá ið tað valdaðist, hvussu vandlátur handilsforvaltarin var í málinum.

Hóast samráðingarmenninir hjá ríkisvaldinum vóru væl kunnigir við tey ymsu sjónarmiðini, kundu teir ikki einans fara eftir teimum. Eina greiðast kemur tað til sjóndar hjá Raben; hann tóktist vera heldur fyri at taka »kvantum« av, um tað bar til. Hesum forðaðu tó vánalig sølulíkindi saman við óttanum fyri ikki at kunna hava tamarhald á hosuframleiðsluni. Harafturímóti bar til innan fyri ávíst mark at rokna út útreiðslurnar í sambandi við hækkaðan ullartakst, soleiðis sum Smit rentuskrivari hevði gjørt.

Eftir málsgongdini at døma átti Raben nógv í tí, at ullartaksturin varð hækkaður; hann hevur ivaleyst hugsað, at tað var betri enn einki fyri føroyingar. Hin vegin tóktust flestir aðrir vera ivasamir um fíggjarligu avleiðingarnar fyri handilin; hetta kom til orða í áritunum.

At hækka takstin í eini tíð, tá ið handilin valla var farin at geva vinning aftan á tey stóru tapini, var eisini stórtøkið. Men stórtøknið bæði í hesum spurningi og viðvíkjandi út-

handlunum, var minni fyri egna rokning enn teirra, ið handilin skuldu festa. Tá ið uppboðið bar ikki ávøkst, fóru bæði í gloymsku.

Føroysku sendimenninir høvdu okkurt heim við sær aftur (so leingi tað vardi), hóast tað valla hevur verið væl fagnað av øllum. Um frá verða tiknar tær óhepnu avleiðingarnar fyri tey fátæku, er úrslitið at meta frægari enn tað, ið væntandi var við teim tvørleikum, handilin hevði at dragast við. Er lítandi á tað sum Worm sigur, hevur umsóknarbrævið frá Hanus Jóanssyni gjørt munin, har sum hann sigur seg nøgdan við 4 fl fyri vágina. Høvdu sendimenninir ikki samst um hetta tá, varð avgerð um taksthækkan neyvan tikin.

## VIÐMERKINGAR

1: Christoffer Gabel (1616—73). Fær 1654 lensbræv um vissar og óvissar inntøkur av Føroyum. Var tætt knýttur at Fríðriki III og var uppií, tá ið einaveldið varð sett á stovn 1660. Rentumeistari og limur í Statskollegiet 1660. Frásettur 1670.
Frederik Gabel (—1708). Sonur Christoffer Gabel. Varalandsstjóri í Noregi 1699.

2: Eisini undir ríkinum fór nakað av hosunum til Hálands, men eisini vórðu tær sendar til týskar Eystarasaltsbýir og til Svøríkis. Eisini tóku herur og floti fittliga stórar nøgdir. »Reviderede regnskaber (Erslev gruppe 21)«. Regnskab for den færøske handel til og fra landet.

3: Nakrir av limunum kundu vóna at fáa handilin.

4: 1 fl (gyllin) á 20 skinn var ein føroysk peningahædd, sum aldri varð sligin til mynt. Hann samsvaraði umroknaður 80 skillingum. Um føroyingar skuldu hava mynt í handilsbúðini, samsvaraði 1 fl bert einum fýramarkastykki. 1 vág = 36 pund.

5: Tilmælið er frá 15.10.1714, úrskurður frá 29.10.1714 (Rentukamarið (Rtk) 2211.64).

6: Fløtið skuldi fara upp úr 1 fl 10 skinn til 2 fl 5 skinn fyri vágina, lýsið skuldi fara upp úr 5 fl 14 skinn til 7 fl fyri tunnuna.

7: Hetta varð gjørt í brævi frá rentukamarinum til landfútan 12.6.1715 Rtk 372.5).

8. Sama stað sum í viðm. 2.

9: 14.7.1718 (Rtk 371.6). Frumskjalið á Føroya landsskjalasavni.

10: Peter Raben (um 1661—1727). Varaadmirálur 1710, admirálur 1714. Stiftsyvirmaður yvir Íslandi og Føroyum 1720—27.

11: 18.5.1720 (Rtk 372.6).
12: (Rtk 372.22).
13: Brævabókin er á Føroya landsskjalasavni.
14: *Fleiristaðni í sama pakka, serliga undir frásøguni frá samráðingunum* 24.12.1723 (Rtk 372.75).
15: Frágreiðing 9.10. 1720 (Rtk 372.22).
16: Sbr. samtykt 9.4.1723 (Rtk 52.6) og ódagfesta tilnevning (designation) (Rtk 372.75). Tilnevningin frá 2.3.1722 liggur í Rtk. 372.20.
17: (Rtk 372.48).
18: Sum viðm. 17.
19: Christian Carl Gabel (1679—1748). Sonur Frederik Gabel. Varaadmirálur 1715, yvirkrígsskrivari 1716—25. Hann hevði verið í Føroyum og søkti um at fáa lenið eftir deyða faðirs síns, men tað varð honum sýtt. Úrskurður frá 30.6.1708. (Rtk 372.4).
20: Tilmæli frá 29.3.1723 og úrskurður frá 9.4.1723. (Rtk 52.6).
21: Sum viðm. 20.
22: Sum viðm. 20.
23: Tilmæli 16.4.1723, úrskurður og fyriskipan 3.5.1723. (Rtk. 52.6).
24: Úrskurður 3.5.1723 (Rtk 52). Tað leið tó meir enn øld, áðrenn hetta varð framt.
25: Samtykt 31.7.1723, upplisið í Tórshavn 3.8.1723. Frumrit í Rtk 372.75.
26: »Slie«.
27: »Flier«.
28: Skrivað á bønarskrivið (supplik).
29: (Rtk 372.75).
30: Tað sama hevði Raben nevnt í tilmælinum 2.3.1722.
31: Christen Worm (1672—1732). Biskupur yvir Sælandi 1711. Føroyar lógu undir Sælands biskupsdømi.
32: 20.11.1723 (Rtk 372.7).
33: M. a. í fundarboðunum 11.12.1723 (Rtk 372.7) og í røðu Worms 22.12. 1723 (Rtk 372.75).
34: (Rtk 372.75).
35: J. C. Svabo: Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781—82 (Kbh. 1959), bls. 282; J. Landt: Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne (Kbh. 1800), bls. 230; A. Degn: Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709—1856 (Thn. 1929), blss. 2—3. Hesar heimildir koma toliliga ásamt um, at maður kann karða til og spinna 2 pund av tógv um dagin umframt vanligan arbeiðssetning. Genta, sum hevði einki annað fyri, kundi binda 2—3 hosur um dagin.
36: Greinargerð í Rtk 372.75. Í royndum er hon ódagfest, men bæði av einum áriti og innihaldinum ber til at tíðarfesta hana til 22.12.1723.
37: Sum viðm. 34.

38: Sum viðm. 34.

39: Lýsi skuldi fara upp til 8 fl fyri tunnuna, fiskur til 1 fl fyri vágina, og fyri fløt skuldu latast 9 merkur í silvri fyri vágina. Við vanligu umrokningini 1 fl = 80 skillingar tóktist hesin prísur lægri enn tann, ið galdandi var (1 fl 16 skinn móti 2 fl), men orsakað av gangvirðinum á silvurpeningi (sbr. viðm. 4), varð uppskotið í roynd og veru 2 fl 5 skinn.

40: (Rtk 372.7).

41: Peder Larsen Smit. Rentuskrivari á norðanfjals skrivstovuni 1710. Kommitteraður í rentukamarinum 1728—42.

42: Sum viðm. 34.

43: Frásøgan frá fundinum er til skjals í brævi frá Raben til rentukamarið sama dag (Rtk 372.75).

44: Sum viðm. 34.

45: Sum viðm. 34.

46: Dagfest 20.3.1723 og inniheldur úrdrátt úr útrokningunum (Rtk 372.75).

47: Sum viðm. 34.

48: Bræv Rabens er til skjals í Rtk 372.75. Viðv. brævinum frá rentukamarinum til Worm, sí Rtk 372.7.

49: Sum viðm. 34.

50: Ummæli Grækarisar Müllers er skrivað á bræv frá Hanusi Jóanssyni 23.3.1723 í Rtk 372.75. Tann lítla hækkanin í lýsisprísinum lá í tí, at tunnuviðurin skuldi vera ókeypis, og var hon soleiðis úr 6 fl til 6 fl 16 skinn.

51: (Rtk 372.2).

52: Tilmæli 17.4.1724, úrskurður 11.5.1724 (Rtk 52.7).

53: Liggur í Rtk 372.2. Skrivað undir høvdu Hanus Hanusson (Hans Hansen), Vilhjálmur Rólvsson (Willem Rolfsen) og Jógvan Ólavsson (Joen Ollesen) úr Norðuroyggjum og Dánial Kristinsson (Daniel Christensen) úr Hoyvík.

54: Sum viðm. 51.

55: 31. august, 7. september og 16. november (Rtk 372.75). Tilætlaða uppboðið átti at hava verið 29. september (Rtk 372.2).

56: Bønarbræv Jákups Zitzke er dagfest 24.1.1747. Úrskurðurin 12.5.1747. (Rtk 372.2).

57: Roknskapurin fyri 1709 er í Rtk 372.48. Roknskapirnir fyri 1710—18 eru í »Reviderede regnskaber (Erslev gruppe 21)». Regnskabsbøger over uld og hoser indkommet til den færøske handel 1710—18. Roknskapirnir fyri desember 1719—1720 eru til skjals í Rtk 372.75.

## SUMMARY

As long as trade in the Faroes was a monopol in the gift of the Danish king, prices were fixed by law. In deciding the prices, the civil servants in Copenhagen had to take various factors into consideration. One was to maintain the population and the economic life of the islands, while another — especially when trade was the direct concern of the Crown — was to ensure a profit. On the other hand the various groups in the Faroes also had their special interests which were dictated by production and consumption.

In 1691, at a time when the trade monopoly had been leased out, the price of wool had been fixed at a very high level, over twice the market price. At the same time, however, in order to limit the production of hose (which was far greater than demand), a quota system was introduced, according to which only a certain proportion of the wool could be sold in the form of finished goods.

The high price of wool made the trade unprofitable, but at the same time it was advantageous for the clergy and civil servants who had large incomes based on wool on the one hand and for the wealthiest farmers on the other. But the poorer farmers and people who did not own land were most interested in producing finished goods from their wool; those without land also wanted a low price for wool, as they had to buy it.

When, in 1709, the King took over the trade monopoly, the time was ripe for change, and both during preparatory discussions on the new charges of the 3rd May 1723 and in subsequent negotiations between Faroese delegates and civil servants in Copenhagen on changes in the new charges, the different interests in the Faroese community are clearly to be seen.

The result of the negotiations was that the price of wool was not reduced by so much as had originally been agreed; but this concession never took effect as plans for leasing the trade came to nothing, and so the civil servants came to the conclusion that there was no economic foundation for the concession.